UTTAN ÚR HEIMI

# Aftur spenningur millum Iran og Vesturheimin



*– Vit hava ikki brúk fyri góðum viðurskiftum við USA, sigur nývaldi iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad*
*Mynd: Reuters*

**Nývaldi forsetin í Iran hevur lovað at fara hóvliga fram, men orðalagið ímillum Teheran og Washington er longu harðnað**

IRAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er lítil ivi um, at viðurskiftini ímillum Iran og USA verða spent tey næstu árini, og summir eygleiðarar siga, at høvuðsmálið hjá pørtunum verður at sleppa undan kríggi.

Tað kom óvart á tey flestu, at tann 48 ára gamli Mahmoud Ahmadinejad vann forsetavalið í Iran. Hann verður roknaður sum ein afturhaldssinnaður politikari, og summi halda hann vera ein skutilssvein hjá teimum ráðandi prestunum. Tí var tað ikki óvæntað, tá hann á sínum fyrsta tíðindafundi aftan á valið gjørdi greitt, at hann og hansara stjórn fara ikki at lata seg ávirka av Vesturheiminum.

– Vit fara at halda fram við okkara kjarnorkuverkætlan, tí hon er neyðug fyri okkara samfelag, segði tann nývaldi forsetin. Bæði ES og USA hava kravt, at Iran skal gevast við sínum kjarnorkuætlan, sjálvt um landið hevur lovað, at kjarnorkan einans verður brúkt til friðarlig endamál.

### Hvørki demokrati ella frælsi

Russiski forsetin, Vladimir Putin, var ein tann fyrsti at ynskja nývalda iranska forsetanum tillukku við valsigrinum, og hann gjørdi samstundis greitt, at Russland er sinnað at halda fram við kjarnorkusamstarvinum við Iran.

Í Washington er orðalagið øðrvísi. Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, duldi ikki fyri, at hann var sera vónsvikin av valúrslitinum í Iran.

– Mahmoud Ahmadinejad er ikki ein, ið stuðlar demokratiið. Hann er heldur ikki ein, ið stuðlar frælsið. Hann heldur seg til teir ráðandi prestarnar, sum gera av, hvussu iranska fólkið skal liva, segði Rumsfeld.

Ísraelska stjórnin er heldur ikki fegin um tað, sum er hent í Iran. Ein talsmaður hjá stjórnini segði sunnudagin, at valið í Iran var ikki frítt, tí prestarnir gjørdu av, hvør slapp at stilla upp. Sambært ísraelska talsmanninum hevur Vesturheimurin ikki annað í at velja enn at avbyrgja Iran.

### Valsvik

Undan tí seinna valumfarinum væntaðu tey flestu, at tann 70 ára gamli fyrrverandi forsetin Hashemi Rafsanjani fór at vinna, og hann hevur lagt myndugleikarnar undir at hava svikað fyri at forða fyri, at hann skuldi vinna forsetavalið.

Nógvir iranar vænta, at tann nýggi forsetin fer at ógilda fleiri av teimum nýskipanunum, sum eru settar í gildi tey seinastu árini. Sum borgarstjóri í Teheran var Mahmoud Ahmadinejad sera afturhaldssinnaður. Eitt nú gav hann boð um, at fleiri matstovur skuldu latast aftur, tí tær hildu seg til vesturlendskar matvanar, og tað eydnaðist honum eisini at steðga einum søluátaki, tí tað brúkti myndir av ensku fótbóltsstjørnuni David Beckham.

Eygleiðarar halda, at tað vóru tey fátæku í Iran, sum tryggjaðu Mahmoud Ahmadinejad sigurin, tí hann lovaði teimum størri part av landsins vælferð og at endurreisa hugsjónirnar frá kollveltingini í 1979.

## Hávur drap 14 ára gamla gentu

Tey, sum spæla sær í sjónum úti fyri strondini í Walton County í Florida, hava vanliga ikki fyri neyðini at stúra fyri hávi, men um vikuskiftið hendi kortini tað, at ein hávur drap eina 14 ára gamla gentu.

Hetta er tað fyrsta hávaálopið har í meiri enn 70 ár, og serfrøðingar siga, at tað hendir neyvan heldur aftur í bræði. Serfrøðingurin George Burgess, sum í mong ár hevur kannað atburðin hjá hávi, sigur við AP, at talan var um ein serstakan tilburð, og hann heldur ikki, at fólki nýtist at stúra fyri fleiri slíkum álopum.

Myndugleikarnir hava latið strondina í Walton County uppaftur, men vaktarhaldið er styrkt munandi.

Tað hendir annars javnan, at hávar leypa á fólk aðrastaðni fram við Florida-strondini, men tað er sjáldan, at álopini kosta mannalív. Seinast var í 2001.

### Handil skal kannast

Fýra limir í amerikonsku Kongressini hava biðið stjórnina kanna, um nakar vandi kann standast av, at kinesarar sleppa at keypa amerikanska oljufelagið Unocal.

Almenna kinesiska oljufelagið CNOOC hevur boðið sær til at keypa Unical fyri góðar 110 milliardir krónur. Verður handilin veruleiki, er er tað met, tí so nógv hava kinesarar ongantíð goldið fyri eitt útlendskt felag fyrr. Men enn eru ikki allar súður syftar, tí amerikanska oljufelagið Chevron er til reiðar at gjalda slakar 100 milliardir krónur fyri Unocal.

Fleiri amerikanskir politikarar hava sagt seg ivast í, um tað er rætt at selja kinesarum Unocal, sum er fimststørsta oljufelagið í USA, og sum hevur høvuðssæti í Kalifornia. Kinesararnir hava roynt at sissa amerikanararnar við at siga, at teir eru til reiðar at seta nakrar amerikanarar í leiðsluna í felagnum aftan á keypið. Tað tykist ikki vera nóg mikið, og tí skal stjórnin í Washington nú kanna, um ein møgulig søla ber nakran vanda í sær, skrivar Reuters.

### Royna nýtt snartok

Í Japan er ein fyritøka farin undir at gera royndir við einum nýggjum snartoki, sum ætlandi skal koyra skjótari enn 400 kilometrar um tíman.

Tað nýggja tokið hevur fingið navnið Fastech 360S. Royndirnar byrjaðu fyri nøkrum døgum síðani, og um vikuskiftið eydnaðist tað at fáa tokið at koyra 275 kilometrar um tíman. Men tað eru japanararnir ikki nøgdir við, og teir hava sett sær fyri, at ferðin skal koma upp á 405 kilometrar um tíman, áðrenn royndirnar enda í 2008. Tey skjótastu tokini, sum koyra í dag, kunnu klára 350 kilometrar um tíman.

Bremsuskipanin á tí nýggja japanska tokinum hevur vakt ans. Fleiri hava heft seg við, at tokið hevur eitt slag av oyrum, sum verða koyrd út, tá tokið skal seta ferðina niður. Oyruni eru so mikið stór, at luftmótstøðan ger, at tokið at enda steðgar, skrivar AP.

### USA eigur at lata meiri

Rockstjørnan Bob Geldof heldur, at USA eigur at veita teimum fátæku í heiminum størri stuðul.

Næsta vikuskiftið skipar Bob Geldof fyri konsertum, sum hava fingið heitið Live 8, og endamálið við teimum at fáa heimssamfelagið at geva fátækradøminum í Afrika størri ans.

ES hevur samtykt at tvífalda stuðulin til tey fátæku londini innan 2015, og nú vil Bob Geldof hava amerikanararnar at gera tað sama. Hann sigur, at tað eru ikki bara pengar, sum hava týdning í hesum føri, men at USA kann ganga undan við at leggja størri dent á fátækradømið. Bob Geldof er heldur ikki nøgdur við tað, sum Kanada ger fyri at beina fyri fátækradøminum í Afrika og aðrastaðni í heiminum.

2. juli verða Live 8-konsertir í fleiri stórbýum so sum London, París, Rom og Philadelphia. millum teirra, sum fara á pallin, eru kend nøvn sum Madonna, U2, Paul Mc Cartney og Coldplay. Fólk í 140 londum fáa høvi at síggja konsertirnar í sjónvarpinum.

### Funnið gamla tekning av skipi

Tey seinastu tvey árini hava norskir fornfrøðingar funnið meiri enn eitt túsund gamlar tekningar, sum eru ristar í grót nærhendis býnum Skien.

David Vogt, sum starvast á lærda háskúlanum í Oslo, sigur við Aftenposten, at tekningarnar eru av fólki, hundum, rossum og øðrum djórum. Harafturat eru næstan hundrað tekningar av skipum. Millum annað er ein fýra metrar long tekning av einum skipi, og hetta er tann fyrsta tekningin av hesum slagi, sum er funnin í Norðurlondum, sigur David Vogt.

Norsku fornfrøðingarnir siga, at tekningarnar stava frá teirri yngru bronzuøldini. Tað merkir, at tær eru ímillum 2500 og 3100 ára gamlar.